# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið Skírhósdag og Langa fríggjadag:**
Lot til andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið Páskaaftan og Páskadag:**
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Øll vildu síggja Norrönu

**Áhugin fyri at síggja nýggju Norrönu var øgiligur, tá almenningurin fekk møguleikan mánadagin**

VITJAN
*Heri á Rógvi*



*Ung sum eldri - øll vildu síggja Norrönu*
*Mynd: Heri á Rógvi*

Seinnapartin mánadagin kundi ein og hvør, sum hevði hug, koma umborð á nýggju Norrönu fyri at skoða verkið.

Mest umtala bygningsverkið í ár hevur kostað útvið áttahundrað milliónir, og tað vóru mong, sum vóru spent at síggja, hvat pengarnir vóru farnir til.

Norröna verður av mongum føroyingum mett sum flaggskipi í føroyska flotanum, og nýggja stásiliga farið livir kanska enn betri upp til heitið nú enn nakrantíð.

Talan er um eina aðra verð i mun til gomlu Norrönu, og tað er heldur ikki so undarligt, tá havt verður í huga, at aldursmunurin er meira enn tretivu ár.

Fólk flest, sum vóru umborð mánadagin, hildu, at talan var um eitt stásiligt skip, ið var var stóru íløgan verd.

Nógv høvdu ymisk at peika á, men tað vóru nokk tey flestu, sum kundu hugsað sær at farið ein túr.

Nýggja Norröna tekur 800 persónsbilar, og plássið við bryggju er bert til 250.

Smyril Line, løgreglan og onnur fingu mánadagin ein lítlan smaksprøva fyri, hvussu skilið kann fara at vera, tí parkerað varð allastaðni, har tað á nakran hátt var gjørligt við nógvu bilunum, sum vóru komnir oman til atløguplássi hjá nýggju Norrönu við Eystaru bryggju.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa talið á teimum vitjandi mánadagin, men talið var mestur nøkur túsund í alt.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷9 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | – |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | ÷2 |
| Halifax | 3 |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 167 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 8 |
| Moskva | 9 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 13 |
| Róm | – |
| Malorca | 19 |
| Athen | 18 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 24 |
| New York | 12 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 997 hPa. við Ísland fer í landnyrðing og grynnist. Eitt hátrýst, 1036 hPa. yvir Eystursjónum stendur mestsum í stað.




Lágtrýstið við Hvarvið fer vestureftir. Hátrýstið yvir Eystursjónum fer eisini vestureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/04 kl. 06[00]– 15/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,9°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 7,1 mm – mált frá 14/04 kl. 06[00]–15/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 11,9 mm

HESTPRENT Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

16. apríl: Fullmáni
17. apríl: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. apr | 07.01 | 19.20 | 06.01 | 18.20 | 06.16 | 18.35 | 09.01 | 21.20 | 10.01 | 22.20 | 05.16 | 17.35 | 04.16 | 16.35 | 07.16 | 19.35 | 08.16 | 20.35 | 06.46 | 19.05 | 08.01 | 20.20 |
| 17. apr | 07.38 | 20.04 | 06.38 | 19.04 | 06.53 | 19.19 | 09.38 | 22.04 | 10.38 | 23.04 | 05.53 | 18.19 | 04.53 | 17.19 | 07.53 | 20.19 | 08.53 | 21.19 | 07.23 | 19.49 | 08.38 | 21.04 |
| 18. apr | 08.30 | 20.58 | 07.30 | 19.58 | 07.45 | 20.13 | 10.30 | 22.58 | 11.30 | 23.58 | 06.45 | 19.13 | 05.45 | 18.13 | 08.45 | 21.13 | 09.45 | 22.13 | 08.15 | 20.43 | 09.30 | 21.58 |
| 19. apr | 09.26 | 21.55 | 08.26 | 20.55 | 08.41 | 21.10 | 11.26 | 23.55 | — | 12.26 | 07.41 | 20.10 | 06.41 | 19.10 | 09.41 | 22.10 | 10.41 | 23.10 | 09.11 | 21.40 | 10.26 | 22.55 |

5 707265 100036 >